Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Byrgingin um Haraldssund

Spurningar:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at nýta ein part av grótinum úr tunlunum norður um Fjall til at gera byrgingina um Haraldssund lidna?
2. Nær er ætlanin at gera byrgingina lidna?

Viðmerkingar:
Nú gjørt verður klárt at bora norður um Fjall, kundi ein loysn verið at nýtt ein part av grótinum úr tunlunum til at gera byrgingina um Haraldssund lidna. Tað hevur verið frammi í politisku skipanini av og á at gera byrgingina lidna, men nú tunnilsarbeiðið nærkast, hevur onki verið at hoyrt um hetta.

Tað hevur eisini verið frammi, at Klaksvíkar kommuna hevur gjørt avtalu um ein part av grótinum. Hetta skuldi tó ikki forðað fyri, at byrgingin eisini verður gjørd liðug, uttan so, at avtala er gjørd um at veita Klaksvíkar kommunu alt grótið.

Byrgingin um Haraldssund er ongantíð gjørd heilt liðug og eru umstøðurnar at koyra ikki góðar, tá veðurlíkindini eru vánalig.[1] Landsverk hevur gjørt fyrireikingar til eina verkætlan, sum skal gera byrgingina lidna, og Landsverk hevur í samferðsluætlanini fyri 2021-2024 mælt til, at verkætlanin verður gjørd beinanveg.

Spurningurin verður settur fyri at fáa greiðu á ætlanunum hjá landsstýrismanninum hesum viðvíkjandi.

Á Løgtingi, 20. september 2021

Eyðgunn Samuelsen

[1] https://www.logting.fo/mal/mal/?id=8467